# Nøvn

## Føðingar

10. november fingu Bjarta og Eyðun Jespersen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3420 gr.

17. november fingu Kristianna og Fríðrik Heinesen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4200 gr.

18. november fingu Hildigunn Lamhauge og Lars J. Jensen, Saltangará, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3950 gr.

19. november fingu Maj Johannesen og Heini Fosaa, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3485 gr.

19. november fingu Turið Arge og Otto Andreasen, Argjum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

20. november fingu Eilin Petersen og Høgni Vesturdal, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3950 gr.

20. november fingu Elsie og Haakon Magnus Djurhuus, Leirvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3850 gr.

21. november fingu Meivør og John Elias Jakobsen, Skála, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4100 gr.

21. november fingu Erna og Asbjørn Østerø, Eiði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3960 gr.

22. november fingu Laila K. Hvíthamar og Alex Beck, Norðuri í Sundum, Kollafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr.

22. november fingu Mai-Britt Kjærbo og Róaldur Jákupsson, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3800 gr.

23. november fingu Gunnvá og Sjúrður Joensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3430 gr.

23. november fingu Anna í Garði Patursson og Jógvan Heinesen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4400 gr.

29. november fingu Amanda og Herman Martin Petersen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3810 gr.

## TØKK

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Jens Dam**

doyði og fór til gravar.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Sjóndepilin
Og tøkk til tykkum mongu, sum sýndu Jensi heiður og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Somuleiðis takka vit hjartaliga tykkum, sum mintust Jens á 95 ára føðingardegi hansara.

**Vegna familjuna**
***Sigrid***
***Joan, Jens Johann og Pia***

# Nýklaktir zoneterapeutar



*Tann 7. november fingu átta zoneterapeutar handað prógv. Tær er f.v.: Jonna Johannessen, Nes - Toftir, Guri Jacobsen, Viðareiði, Hanna Hanusardóttir Hansen, Tórshavn, Malan Thomsen, Tórshavn, Annsy Høghamar, Tórshavn, Sheila Rein, Tórshavn, Konny Joensen, Toftir, og Inga Malena Samuelsen, Sandavágur.*




# Kennist nakar við hesi?

Vit hava fingið hesa myndina frá Skjala- og myndasafn Norðfjarðar í Íslandi.

Myndin er tikin í Føroyum, og hevur hon tískil okkurt samband við føroyingar.

Kennist nakar við hesar persónar vilja vit fegin frætta á telefon 315769 ella teldupost olijacobsen@olivant.fo.

# Vandringsmenn á føroyskum

Lag: Oss kan du møte på al verdens veje

Tú møtir okkum, hvar tú enn man ferðast,
Vit hava traðkað hvønn ein blett á fold.
Tann pjøk' vit eiga, er alt, ið skal berast,
her undir mánaskin og stjørnufjøld.

Vit hava sæð, tá sól í vestri setur,
hoyrt áarløkir leika lag sítt frótt,
hoyrt fuglin, tá kring reiður sítt hann letur,
og fleyrið anda stuttu summarnátt.

Vit droyma um tær grønu, føgru víddir,
so langt vit skoða er tað ævigt vár,
og tindarnar við sólargeislum prýddir
- eitt ævintýr, hvar ferðin so enn gár.

Tá sól er sett, og skýming er um landið,
og fossar syngja blídligt kvøldarlag,
á ferðini vit kenna vinarbandið,
og njóta allar løtur nøgd og glað.

Vit tak' ímót og geva alt, vit fáa,
so ríkur, fegin eingin annar er
sum vit, tá stjørnur yvir okkum loga
og lýsa fótum várum fram á ferð.

**J týddi**